VÍÐKAÐA FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
MAI - JUNI 2004
SKRIVLIG FRAMSETING



4 tímar

Næmingurin kann hava hetta uppgávuarkið alla tíðina. Loyvt er at brúka orðabøkur.

Vel eitt av hesum evnum:

1 Børn og náttarlív
2 „Heimurin í dag"
3 Ungur kærleiki
4 Uppaling
5 Arbeiði eftir skúlatíð

1 Børn og náttarlív

Les tekstin

- Sig, millum annað við støði í tekstinum, tína hugsan um børn og náttarlív

Verjir bæði børnini og foreldrini

Rúna Sivertsen heldur, at ógvuliga nógvir fyrimunir eru við eini sonevndari „útiverulóg"

– Tað líkist ongum, at børn og blaðung ganga úti og vála seint um kvøldið og um næturnar. Tað heldur Rúna Sivertsen, sum hevur verið varalimur í løgtinginum fyri fólkaflokkin í Norðoyggjum.

Hon sigur, at tíverri er tað vanlig sjón at síggja børn og blaðung ganga úti og taka lut í náttarlívinum, og tað, heldur hon, er ein stórur vansi fyri børnini.

Men hon heldur eisini, at hetta er ein trupulleiki, sum løgtingið eigur at leggja seg útí.

– Løgtingið eigur rætt og slætt at seta lóg í gildi, sum bannar børnum og ungum at ganga úti seint á kvøldi og um næturnar, uttan so at tey fylgjast við vaksnum fólki.

Hon sigur, at í Íslandi er slík lóg galdandi. Har er lógin soleiðis orðað, at um veturin hava børn upp til 12 ár ikki loyvi at ganga einsamøll úti eftir klokkan átta um kvøldið. Børn ímillum 13 og 16 ár hava ikki loyvi at ganga úti eftir klokkan tíggju um kvøldið.

Um summarið eru tíðarfreistirnar fluttar tveir tímar fram til ávikavist klokkan 10 og midnátt.

– Børn og blaðung, sum ganga úti og vála um næturnar, eru í nógv størri vanda enn onnur at gerast kriminell.

– Hetta eru børn, sum mangan kosta samfelagnum ovurhonds stórar upphæddir. Hetta eru børn, sum eru í stórum vanda at gerast atferðartrupul. Og tað eru eisini hesi børnini, sum fyri ein stóran part fylla stovnar av ymiskum slagi. Tey kunnu oyðileggja sær alla tilveruna.

Hon heldur, at ein „útiverulóg" kundi verið ein verja hjá bæði foreldrum og børnum.

– Tað eru mong foreldur, sum hava mist tamarhaldið á børnunum og standa hjálparleys og fáa ikki børnini inn um kvøldarnar.

– Men ein slík lóg kann eisini verja børnini fyri foreldrum, sum svíkja tey, antin av tí at tey hava rúsdrekka- ella onkrar sosialar trupulleikar. Tekur løgreglan eitt barn upp seint á kvøldi, ber til at fara heim við barninum og kanna eftir, hvussu ið støðan er heima við hús.

Hon ivast ikki í, at varð „útiverubann" sett í verk, hevði tað byrgt fyri nógvum av teimum trupulleikum, sum taka seg upp við børnum og ungum. Og hon heldur, at tá ið íslendingar kunnu hava eina slíka lóg, kunnu vit eisini hava eina tílíka lóg í Føroyum.

(Sosialurin, 13. november 2004)

2

„Heimurin í dag"

Les tekstin

- Ger tínar viðmerkingar til tekstin
- Hvat sigur hann um tína stoðu í alheimshøpi?

Tøl, ið tala!

Høvdu vit kunnað minkað jørðina og mannaættina til eitt lítið stað við 100 fólkum, og vit høvdu havt sama lutfalsliga býti á øllum økjum millum øll fólkasløgini á jørðini, so hevði heimsmyndin sæð nakað soleiðis út

Á jørðini høvdu tá búð:

57 ásiatar, 21 evropearar, 14 amerikanarar, 8 afrikanarar
52 høvdu verið kvinnur, 48 høvdu verið menn
30 hvít og 70 ikki hvít
30 kristin, 70 ikki kristin
89 hinskynd (heteroseksuell), 11 samkynd (homoseksuell)
6 fólk høvdu átt 59% av øllum heimsins ríkidømi, og tey høvdu øll verið amerikanarar

80 høvdu ikki havt nóg góðan bústað
70 høvdu verið ólesingar (analfabetar)
50 høvdu fingið ov lítið at eta
1 fólk hevði doyð
2 fólk høvdu verið fødd
1 fólk hevði átt teldu
1 fólk hevði havt hægri útbúgving

(Teldubræv: "Altjóða vinavika," desember 2003)

3 Ungur kærleiki

Les yrkingina

- **Skriva so tína hugsan um forelskilsi og ungan kærleika**

Vit høvdu klandrast –

Vit høvdu klandrast –
orð ókst av orði,
eg sló í borðið
og illa læt,
tú helt teg stinna,
men tú vart genta,
tú gavst og – græt.

So fóru vit út,
hvørt sínu megin
og ynsktu vegin
dupult so breiðan;
eg helt meg reiðan,
men angraði illa –
og hvussu skuldi eg bera meg at
at fáa teg stilla?

Tá møttu vit eini ókunnukonu
og serliga óviðkomandi konu:
Nei, góðan dag,
hvussu hava tit tað?
Men hvat er í vegin,
hvørt sínu megin,
tit, sum eru ung
og skuldu verið glað,
hvat er nú tað? –
Og upp og niður
og niður og upp –
eyguni spældu
og hond í hupp.

– Tá brast tú útúr,
og láturin vaks sum áarflóð,
mítt ástyndisfljóð –
eg hoknaði niður í knøini;
vit flentu og flentu
so tárini runnu –
og hon stóð eftir við gapandi munni
so púrasta frá sær í øðini:
men hvat í allari verðini skal – ?
Far væ-ha, far væl!

Men eitt vit lærdu, elskaða vina,
at látur kann alla ilsku lina,
og annað vit lærdu á somu stund:
at hvat ið so annars verður í vegin,
– um orð eykst av orði
og nevin villist úr lumma á borðið –
at fara vit út,
so verður tað altíð somu megin.

(Úr yrkingasavninum "Tokkaljóð" eftir Regin Dahl, 1944)

4 Uppaling

Hygg at myndunum niðanfyri

- **Skriva, millum annað við støði í myndunum, tína hugsan um evnið**



(Myndirnar eru úr "Samfelagsfrøði 1" eftir Petur Ova Petersen, Óli Petersen teknaði)

5 Arbeiði eftir skúlatíð

Nógvir skúlanæmingar arbeiða eftir skúlatíð, bæði yrkadagar og í vikuskiftinum

- **Skriva um evnið**